## DAGSINS MEINING

# Heimastýrið endaði omaná

Løgtingið er sett, og tingið er farið undir árið, har teir skulu halda 150 ára dagin fyri endurstovnanina. Edmund Joensen gjørdist tingformaður, og sambart Stýriskipanarlógini skal nógv til, um hann ikki skal vera tingformaður alt valskeiðið. Edmund Joensen verður tingformaður uttan mun til, hvør samgonga verður skipað komandi dagarnar. Í sær sjálvum hevur tað kanska ikki tann stóra týdningin, hvør situr í formanssessinum, men mátin, sum valið gekk fyri seg uppá, ber kanska boð um, hvat er í ljósmála.

Í formansumfarinum skjeyt formaðurin í C, Jóannes Eidesgaard upp, at Edmund Joensen varð valdur til formann. Undir atkvøðugreiðsluni vísti tað seg, at gomlu heimastýrisflokkarnir stuðlaðu Edmundi. Tað mest áhugaverda var, at D ikki stuðlaði A men heldur stuðlaði uppskotinum hjá B og C. Tað kundi boðað frá, at heimastýrisflokkarnir hava funnið saman, og í fyrstu atløgu sær tað út til, at D hevur loyst seg frá tætta sambandinum, sum hann hevur havt við A.

Taktiska spælið í sambandi við formansvalið vísti eisini, at E og A ikki standa øksl við øksl, ið teir hava gjørt seinastu fýra árini. A hevði Óla Breckmann í uppskoti. Tað kundi neyvan vera fyri, at Óli skuldi verða valdur. Tað kann ikki roknast við, at hann, ið seinastu fjórðings øldina hevur havt sera stóran leiklut í tí politiska spælinum í Føroyum, hevði latið sær lynda at sitið í formanssessinum. Heldur varð leikurin í politiska talvinum hjá A hesaferð, at hann boðaði frá, at hann ikki ætlar sær í samgongu við E. Men hann vildi ikki stuðla øðrum valevni enn sínum egna. Leikurin hjá A kann takast sum tekin um eina búningarprosess, ið er í gongd. Hetta kundi bent á, at ABCD, ið vórðu í samgongusamráðingum fyrrakvøldið, hava hug at finna saman aftur. Spurningurin, ið tað slitnaði uppá, var, hvør skuldi vera løgmaður. Við at C aktivt var við at velja Edmund Joensen til formann, og við tað at A passivt stuðlaði hesum valinum, eru greiðar ábendingar um, at B hevur slept kravinum um at fáa løgmann. Nú verður talan um eina telving millum A og C um leiðsluna í samgonguni.

Omanfyri standandi vórðu ábendingarnar, ið hómaðust, tá núvalda løgtingið skipaði seg. Spurningurin er so, hvat gongur fyri seg handan leiktjøldini. Eingin ivi er um, at omanfyri nevnda samgonga er tann, sum B og C helst vilja. Leikurin hjá A kundi sum sagt boða frá, at teir eru við uppá hesa samgonguna. Men tað er eingin loyna, at í A ganga bólkarnir hvønn sín vegin. At Bjarni Djurholm heldur fram í landsstýrinum, sum ikki hevur undirtøku frá samgonguni, ið skipaði landsstýrið, hevur við sær, at Poul Michelsen, ið vildi styrkja sjálvstýrisvongin í A, kom inn á ting. Saman við øðrum í A fer hann ivaleyst at arbeiða fyri, at samgongan, ið hevur sitið til nú, heldur fram. Bjarni Djurholm og hin vongurin í A hevði størri undirtøku á valinum, og tí kann væl hugsast, at um Bjarni Djurholm og hansara menn ikki fáa sín vilja í politiska talvinum komandi dagarnar, fer Bjarni at taka seg úr landsstýrinum og harvið verður Poul Michelsen settur út úr politiska talvinum.

Vit kunnu aftur staðfesta, at Heimastýrissamgongan vann løgtingsformannin. Vit kunnu eisini staðfesta, at tað tykist sum um D er loystur frá avtaluni, ið hann hevur havt við A. Um hetta er permanent ella hetta bara er ein passivur leikur fer framtíðin at vísa. Men tað er neyvan nakar ivi – og tað kom fram í valstríðnum – at tað hóvar D illa, at A verður ov sjálvstýrissinnaður. Tí er tað mest áhugaverda komandi dagar, hvør fer at enda omaná og hvør fer at liggja undir í innanhýsis toganini í A. Men A er kortini ikki so sentralur longur, ið hann hevur verið, tí um tað skuldi hent, at sjálvstýrisvongurin endar omaná, so vísti formansvalið, at sannlíkið er størri fyri, at teir hava mist D, ið teir hava havt so tætt inn at sær. Tað vil við øðrum orðum siga, at møguleikin at skipa eina meirilutasamgongu millum E, A, D og H er ikki so stórur nú, sum hann hevur verið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin til reiðar at skipa sjálvstýrissamgongu

TÍÐINDASKRIV





Tað er við stórari undran, at undirritaðu flokkar eygleiða politisku gongdina í løtuni.

Tjóðveldisflokkurin hevur loyalt stuðlað teirri 16-manna samgongu, sum seinastu 14 dagarnar hevur verið grundarlagið hjá løgmanni í royndunum at skipa meirilutastjórn.

Miðflokkurin hevur boðað greitt frá, at hann er til reiðar at fara upp í samgongu at halda fram við sjálvstýrisgongdini.

Síðani hevur verið roynt at skipa eina breiðari samgongu við javnaðarflokkin, har Tjóðveldisflokkurin so knappliga stendur einsamallur flokkur móti trimum øðrum við ætlanunum um at halda fram við sjálvstýristilgongdini.

Í løtuni eru so samráðingar millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Hetta tykist okkum sera margháttligt og óskiljandi. Bæði út frá valúrslitinum, har tað var greitt, at ein greiður sjálvstýrismeiriluti er á tingi, og út frá teimum týdningarmiklu avgerðunum fyri framtíðina, sum skulu takast júst nú.

Tí skulu vit enn einaferð boða alment frá, at Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin eru til reiðar at skipa eina sjálvstýris-samgongu við Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin, ið kann halda fram við eini miðvísari og tryggari sjálvstýrisgongd, og sum eitt nú kann loysa týdningarmiklu trivnaðarmálini, vinnumálini, útbúgvingarmálini o.a.

*Tórshavn, 14. mai 2002*

**Vegna Miðflokkin**
**Jenis av Rana**

**Vegna Tjóðveldisflokkin**
**Høgni Hoydal**

# Kære mit færøske barn

**Christel Kniep**

Du siger altid, at vi ikke taler samme sprog og at kun dine venner forstår dig. Jeg prøver derfor at skrive til dig for at få din opmærksomhed og for at sige, at nok er vi forskellige, men vi har også meget til fælles. Jeg vil gerne være din ven. Vores forhold er unikt – vi har så meget til fælles.

Enhver mor ved, at hendes barn een dag vil løsrive sig og klare sig selv. Det ved også jeg. Jeg husker kun alt for tydeligt min løsrivelse fra min far og kampen for selvstændighed. Jeg er da også helt på det rene med, at du nok snart flytter fra hjemmet.

Jeg vil bare gerne lade dig forstå, at jeg ønsker dit venskab. For vi har delt hjem gennem så mange år og jeg synes, at du er skøn og jeg er stolt af at have levet livet med dig i de år vi har haft sammen.

Jeg har set verden, haft min dannelsesrejse rundt om jorden, arbejdet i forskellige lande i Europa – taler deres sprog og forstår dem – men det til trods er vores kultur forskellig.

Kære mit færøske barn. Tag ud, se dig omkring i verden. Så tror jeg, at du kan se, at nok er vi forskellige, men vi har også meget til fælles.

Jeg vil så gerne øse af den erfaring jeg har fået og lære dit af de skrammer jeg har fået. Når man har været ude forstår man, hvad det er man får ind med modermælken og at ude er godt men hjemme er bedst.

Du er voksen nu og du er parat til at flytte. Jeg ved, at du ikki har pengene. Og jeg vil gerne hjælpe dig. Det findur vi ud af. Jeg betaler alligevel så mange penge i skat hver måned, det går til unyttige mennesker og ting. Jeg betaler gerne til dig, for jeg ved, at det koster at lære at stå på egne ben. Og jeg ved at man kan komme i uføre – uden at ville det – hvis man ikke har penge. Du skal aldrig stå og blaffe ved landevejen. Du skal have smør til brødet. Det er sikkert og vist.

Det er ikke pengene, der skal skille os ad for jeg vil dit venskab! Ikke et mor-barn-venskab – men som to ligeværdige mennesker.

Du synes altid, at jeg vil bestemme og belære dig. Måske har du ret. Dine søskende har altid sagt det samme. Men husk jeg vil gerne være din ven. Og en ven støtter sine venners svage sider – med håb om selv at få støtte.

Jeg ved, at jeg ikke kan beskytte dig mod verden udenfor. Hør mit råb over havet: Tag ud, pas på dig selv på din vej, men kom hjem! Lad ikke vandene skille os ad. For verden er stor og vi to er kun dråber i havet. Sammen er vi dog stærkere!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Best er at skilja ferðsluna sundur

TÍÐINDASKRIV



Best er at skilja tey, sum eru til gongu og tey, sum eru á súkklu, frá aðrari ferðslu. Men av tí at tað er so tætt bygt í miðbýnum og gomlu býarpørtunum, verður mett, at neyðugt er at finna aðrar loysnir. Her verður t.d. hugsað um ymiskar ferðavmarkingar. Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur mangan víst á, at verður ferðin minkað, so verða avleiðingarnar av ferðsluóhappum ikki so ógvuslig, – t.d. fáa tá færri varandi mein, og færri láta lív í ferðsluni, um ferðavmarkingar verða framdar. Bólkurin heldur tí, at besta loysnin í nýggju býarpørtunum er at skilja tey, sum ganga og tey, sum súkkla, frá aðrari ferðu. Hetta kemur fram í einiu nýggjari frágreiðing um ferðsluna í havn

3. mars 2001 samtykti Tekniska nevnd í Tórshavnar kommunu at seta ein bólk at »orða ein kommunalan ferðslupolitikk«.

Tekniska nevnd hevði tá viðgjørt ymsar møguleikar at avmarka tungu ferðsluna í miðbýnum. Men av tí at tað vóru so mong onnur viðurskifti í ferðsluni, sum støða mátti takast til, varð gjørt av at seta ein arbeiðsbólk at viðgera málið. Í arbeiðsbólkin vórðu vald: Bogi Haraldson, býarverkfrøðingur, Heini á Borg, farmaflutnigsleiðari hjá Strandfaraskipum Landsins, Kristina Kristiansen fyri løgregluna og Jákup Jacobsen, stjóri, á Bileftirlitinum.

Finnur Petursen, sum arbeiðir á Teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu, varð settur at vera skrivari hjá bólkinum.

**Arbeiðssetningur**
Arbeiðsbólkurin fekk soljóðandi arbeiðssetning:

– Gera heildarætlan viðvíkjandi tungari ferðslu í býnum, serliga í miðbýnum.

– Orða rætningslinjur á økjum, um hvar koyrast kann, og nær serlig loyvi eiga at vera givin.

– At gera heildarætlan um parkeringsviðurskifti í býnum, serliga í miðbýnum.

– At kanna umstøðurnar hjá fólki til gongu, á súkklu og øðrum, sum eru veik í ferðsluni og vísa á, hvar ábøtur kunnu gerast.

– At kanna umstøðurnar við dagstovnar, skúlar og onnur støð, har børn ferðast og vísa á møguligar ábøtur.

– At vísa á serliga vandamikil støð í býnum t.d. krossvegir og øki við handlar, og koma við uppskotum til ábøtur.

– Viðgera aðrar spurningar um ferðslu, sum bólkurin metir vera rætt at taka upp.

**Spurnarbløð**
Bólkurin hevur gjørt fleiri áhugaverdar kanningar. T.d. hava skúlar, skúlanæmingar og dagstovnar fingið spurnarblað við ymiskum spurningum í sambandi við ferðsluviðurskifti.

Spurnarbløð vóru latin øllum skúlanæmingum í Havn í fjør (2001). Tá vóru 4.448 børn í skúlaaldri. 3.228 skúlanæmingar hava svarað spurningunum og latið arbeiðsbólkinum spurnarblaðið aftur. Hetta svarar til 72% av skúlabørnunum.

Ein av spurnigunum, sum settur var børnunum, var, hvussu tey mettu ferðsluumstøðurnar vera, tá ið tey fara í og úr skúla. Børnini kundu velja ímillum 5 svarmøguleikar, og úrslitið gjørdist, at:

569 børn svaraðu: sera vánaligt, 1590 vánaligt, 629 hampiligt, 343 gott, og 96 børn svaraðu sera gott.

**Sera stórur vøkstur í bilatali**
Kanningin vísir eisini, at vøksturin í bilatalinum í Føroyum hevur verið sera stórur seinastu árini. Í tíðarskeiðinum 1995 til 2002 er vøksturin fyri alt landið 38,5%. Fyri Havnina er talan um ein vøkstur upp á 38,3% frá 1995 til 2002.

**Ferðslumátingar**
Tórhavnar kommuna hevur 3 teljistøðir. Ein teirra er í R.C.Effersøesgøtu. Í 1995 vístu teljingarnar, at um 5.000 bilar koyrdu á hesum vegastrekki um samdøgrið.

Og í 1999 var ferðslan vaksin so nógv, at ikki minni enn 10.200 bilar koyrdu á hesum sama strekki um samdøgrið.

Nýggjastu teljingarnar vísa, at ferðslan á hesum vegastrekki er minkað til umleið 9.800 bilar um dagin. At ferðslan er minkað á hesum vegastrekki, verður sett í samband við, at nú er koyrandi eftir ringvegnum út í Marknagil.

**Miðbýurin**
Ein orsøkin til, at arbeiðsbólkurin varð settur, var, at umsiting og politikarar halda, at neyðugt var at gera broytingar í ferðsluviðurskiftunum í miðbýnum. Tí verður eisini roknað við, at eitt tað fyrsta, sum hendir, er, at Tekniska deild hjá Tórshavn kommunu setur seg í samband við handlarnar í miðbýnum. Og roknast kann við, at eitt av úrslitunum verður, at tunga ferðslan verður tíðaravmarkað í miðbýnum.

**Parkeringviðurskifti**
Fyri at bøta um parkeringsviðurskiftini á Eystaru bryggju verður roknað við, at stóra gula pakkhúsið við Farstøðina verður tikið niður, og at økið verður umlagt til parkeringspláss. Her verður t.d. eisini hugsað um, at nýggja Norrøna og nýggi Smyril fara at kevja munandi størri øki til bilar og parkering.

Samstundis hevur verið nevnt, at ætlanin er, at Eimskip skal byggja nýtt pakkhús á Skansabryggjuni, og at Strandferðslan skal flyta í pakkhúsið, har Eimskip nú húsast.

**Fleiri rundkoyringar og betri umstøður hjá skúlabørnum**
Í niðurstøðuni hjá arbeiðsbólkinum verður eisini mælt til, at fleiri rundkoyringar verða gjørdar í Havnini, og at bøtt verður um ferðsluviðurskiftini við skúlarnar.

Harumfarmt verður mett, at neyðugt er at gera fleiri busslummar í býnum.

# Orfeus konsertin í mai 2002

TÍÐINDASKRIV

Mikukvøldið 15. mai 2002 kl. 19.30 varð tann seinasta konsertin í Orfeusrøðini hjá Tónlistafelagi Norðurlandahúsins heystið 2001/várið 2002.

Á konsertini mikukvøldið vórðu 3 luttakarir, sum eru: Klarinettleikarin Bernhard Zachhuber, úr Wien, klaverleikarin Jóhannes Andreasen og violaleikarin Nikolaos Kapnas.

**Eitt sindur um teir tríggjar:**

**Bernhard Zachhuber:**
Er føddur í Linz og hevur lisið klarinettspæl og tók einleikaraprógv í 1990. Longu í lestratíðini spældi hann javnan við í Wiener Philharmoniker sum hjálparmaður og á fløguupptøkum. Tey síðstu árini hevur Zachhuber fingist mest við nýggja tónlist og hevur spælt ymstastaðni t.d. á Brucknerfest Linz, Jazzatelier Ulrichberg, Biennale Berlin, Mozartwoche í Salzburg og Tokyo, Schleswig-Holstein-Musikfestival og á flestu europeisku konsertserium, ið leggja høvuðsdentin á nýggjan tónleik.

Síðani 1994 hevur Bernard Zachhuber verið limur í Klangforum Wien og hevur við hesum bólki fingið fleiri virðislønir fyri fløguupptøkur m.a. »Grand Prix du Disques«.

**Nikolaos Kapnas:**
Er føddur í Tashkent, Usbekistan og gekk á musikskúla í heimbýnum. Útbúgving sína tók hann á tónlistarskúlanum í Tessaloniki, Antwerpen og Bruxelles. Hann starvaðist í 16 ár sum soloviolaleikari í BRT filharmoniska orkestrinum í Bruxelles. Við hesum orkestri og sum kamartónleikari hevur hann spælt konsertir í nógvum evropeiskum londum. Í 1998 fluttu hann við familju síni til Føroya at búgva og undirvísir í musikskúlaskipanini og er annars virkin í tónleikalívinum. Hann er limur í bólkinum Musica Viva.

**Jóhannes Andreasen:**
Tók prógv í klaverspæli og tónleikanámsfrøði á »Hochschule fur Musik und darstellende Kunst« í Wien, har hann hevði Walter Fleischmann sum lærara. Seinni las hann eitt skifti á »International Menuhin Music Academy« í Sveis og í eitt ár hjá Peter Feuchtwanger í London. Hann hevur verið á masterskeiðum hjá Edith Picht-Axenfeld o.fl.

Umframt at Jóhannes Andreasen starvast sum lærari í musikskúlaskipanini hevur hann virkað sum tónleikari. Hann hevur tikið lut í fløguútgávum hjá Extraplette, Kontrapunkt og Tutl, og er hann somuleiðis ein teirra, sum hava sett á stovn bólkarnar Aldubáruna og Musica Viva.

Á skránni fyri konsertini mikukvøldið vórðu spæld verk eftir m.a.: Debyssy, Poulenc og Mozart.